

*Bøsdalafossur* *Mynd: Ólavur Poulsen*



*Reipsáfossur – hvørvur* *Mynd Kalmar*

okkum minni bundin av olju og annars at minka um CO2 útlátið.

Vatnorkuútbyggingarnar økja bert el-framleiðslu okkara á landi við varandi orkukeldum við 5% og tað hevur tí ongan týdning fyri tryggleikan.

## CO2 útlátið

Setið ikki spurnartekin við álvaran í mannaskaptu ávirkanini á veðurlagið og at nakað skal gerast.

Alheimstiltøkini, ið skulu minka CO2 útlátið vera gjørd fyri at verja náttúruna.

Vit ætla at oyðileggja okkara náttúru fyri at verja náttúruna hjá hinum og samstundis skulu vit í krónum og oyrum gjalda ein okurspris fyri tað, tí fíggjarliga hanga vatnorkuútbyggingar í Føroyum als ikki saman.

Hetta fer so aftur at føra við sær, at el-prísur okkara í allari framtíð verður nógv hægri enn neyðugt og tað minkar munandi umkappingarførihjávinnulívinum og tyngir óneyðugt um hjá húsarhaldunum.

SEV roynir longu nú at hækka streymprísin fyri at fíggja verandi og komandi vatnorkuútbyggingar. Vónandi sleppa teir ikki tað.

## Veðurlagsráðstevnan

Nú beint uppundir veðurlagsráðstevnuna eru tey ymisku londini farin í skotgravirnar, soleiðis at eingin avtala verður møgulig:

USA hevur gjørt heilt greitt, at tey vera ikki við í einari veðurlagsavtalu í dec. 2009.

Kina, India, Brasilia og Suðurafrika hava í felag sett nøkur ófrávíkilig krøv til bæði ídnaðarlondini og til menningarlondini, áðrenn tey vilja vera við í nakrari veðurlagsavtalu.

Afrikansku londini krevja, at ídnaðarlondini skulu minka sítt útlát 40% áðrenn tey gera nakað.

Grønland krevur størri útlát, samstundis sum okkara landsstýriskvinna tryglar danir um at **lova okkum** at vera sjónlig í dec.

Havi fyrr nevnt, hvussu vit kunnu sjónliggera okkum fram um øll onnur á hesum øki, uttan at oyðileggja náttúruna.

Ein annar háttur at minka skaðaárini av Co2 útlátinum er at verja skógirnar og planta meira av trøum.

Skógarøkir til víddar 3 ferðir Danmark vera á hvørjum ári høgd ella brend, tí ídnaðarlon-dini – sum fyri langari tíð síðani hava høgt/brent sínar skógir – ikki vilja hjálpa mennin-garlondunum at varveita teirra skógir.

## Co2 tjakið ósakligt?

Tað tykist, sum alt tjakið um Co2 útlátið er við at verða eitt sindur hysteriskt, øll royna at yvirganga hvønn annan við tosi um tiltøk um grønu orku, uttan at hugsa um, hvønn skaða hesi tiltøk annars gera á náttúruna ella um tað yvirhøvur letur seg gera fíggjarliga.

Tað er hóast alt ikki meira enn o.u. 40 ár síðani, at fremstu granskarar í USA vóru sannførdir um, at ein nýggj ístíð var á veg og nógv orka var løgd í at granska, hvussu New York og aðrir stórbýir kundu innilokast í glasi fyri at verja teir móti ísfjøllunum, sum fóru at koma norðaneftir.

Næstu ferð verður hugt nærri at áum, ið SEV hevur ella er í ferð við at turrleggja, umframt økir, sum SEV hevur sett undir vatn.

*Tá ið teir nomu landið*
*var tað eitt vakurt land*
*ið ikki var mannasølkað,*
*har var ikki fjøtur ei band.*
*Fossar dundu í botnum,*
*vøtnini skygdu blá –*
*lógu í dýrd og droymdu*
*við lómum og oknum á*

**H.A.D.**





*Sjatlá, ið rennur gjøgnum Vatnsoyrar og út í Sørvágs/Leitisvatn verður næstan turrløgd*



*Tunguáin rennur í Ánna í Fjøllum og saman renna tær í Fjallavatn. Tá hesar verða turrlagdar og Áin í Botni missir nakað av avfallsøkinum minkar vatnið, ið rennur í Fjallavatn við meira enn 50%*